# Familjan Strøm skuldi við Hans Hedtoft



*Sigmund og Olna saman við børnunum Petur, Randi og Tóri, sum høvdu ferðaseðil við Hans Hedtoft. Alt var niðurpakkað og klárt at flyta. Men tað var so "óheppið", at maðurin, sum skuldi loysa Sigmund av í hansara arbeiði, varð seinkaður, so ferðaseðlarnir máttu avlýsast*

Dagin eftir greinina um Hans Hedtoft tann 30. januar frætti eg frá Randi Strøm á Tvøroyri.

Hon greiddi frá, at Hans Hedtoft rørdi við nakrar kenslur hjá sær og beiggja sínum. Tey skuldu nevniliga havt verið við Hans Hedtoft feigdartúrin!

Pápi hennara, Sigmund Strøm úr Trongisvági, sum var timburmaður, fór í 1952 til Julianehåb at arbeiða sum verkstaðsleiðari hjá GTO, sum merkir Grønlands Tekniske Organisation.

Í 1954 fór mamman Olna við teirra tveimum børnum til Julianehåb at búgva. Olna var ættað úr Hvalba, fødd Vest. Tey ferðaðust yvir við Dronning Alexandrine. Tey komu at búgva nakað ovalaga í býnum. Randi verður so fødd í Grønlandi í 1956.

Sigmund var eina óføtur myndatakari, og hann átti eisini eitt framkomið myndatól. Eftir hann liggja nógvar myndir úr Julianehåb. Tá ið Randi seinni hugdi eftir myndum frá teirra tíð í Grønlandi, vóru fleiri av Hans Hedtoft, millum aðrar har hann liggur flaggskrýddur við kai í Julianehåb.

Tá fortaldu foreldrini, sum nú bæði eru deyð, at meiningin var, at tey skuldu sigla heim við Hans Hedtoft fyrsta túrin.

Tey skuldu nevniliga flyta aftur til Føroyar. Alt var pakkað niður, stovan var full av kassum, sum Sigmund hevði gjørt, fyltir við møblum og annars við tí, sum var í húsinum.



*Tóri og Randi í dag*

Men beint áðrenn fráferðina kemur boð um, at avloysarin hjá Sigmundi, ein dani, ikki kundi koma fyrr enn tríggjar mánaðir seinni. Har var einki at gera. Tey máttu avlýsa ferðaseðilin við Hans Hedtoft.

Mamman segði, at tey vóru sera vónbrotin. Tey høvdu verið so leingi burtur, og tey gleddu seg at koma heim.

Randi var tá bert tvey ára gomul, so hon minnist einki til hetta. Men beiggjarnir, Tóri og Petur, sum vóru 6 og 10 ár tá, mintust hetta væl. Petur er deyður seinni.

Var umborð á Hans Hedtoft.

Tóri minnist, at tey øll vóru umborð á hesum flotta skipi, tá ið tað lá við kai í Julianehåb. Hetta var spennandi serliga hjá dreingjum.

Tóri minnist eisini væl hendan ræðuliga dagin 30. januar. Hann og beiggi hansara vóru úti og spældu, tá ið Petur tekur hart í hann. Hann hevði hoyrt í einum radio í onkrum húsi, at okkurt var hent við Hans Hedtoft. Teir runnu heim at vita, hvussu vorðið var.

Heima merkti Tóri tann álvarsama stemningin. Bæði foreldrini lurtaðu, helst hevur tað verið á fiskabylgjuni, eftir gongdini við søkkandi skipinum. Tað bar til beinleiðis at fylgja samskiftinum við Hans Hedtoft.



*Seinni uppá árið slapp Strømfamiljan heim við flogfari hjá íslendska flogfelagnum*

Tóri sigur, at hann enn minnist orðini frá telegrafistinum á Hans Hedtoft: "Vi synker! Vi synker!" Og so var tøgn. Tóri gloymir ikki hesa røddina á Carl Dejligbjerg, sum var ein royndur fjarritari.

Hóast tey vóru skakað, vóru tey sjálvsagt takksom fyri, at tey sjálvi vóru sloppin undan tí vissa deyðanum.

Tey kom heim seinni um summarið, men nú flugu tey. Flogvøllur var nærindis Julianehåb í Narsarsuak. Flogið var við Flugfelag Íslands til Keypmannahavnar umvegis Reykjavík og Glasgow. Men Olna hevði fingið ein slíkan hvøkk, at hon føldi seg ikki ov trygga við at flúgva. Men tað gekk væl.

Sigmund hevði fyrr verið rættiliga nær deyðanum. Hann róði út í Grønlandi í 1939 og kom heim hin tiltikna túrin hjá Niels Finsen, tá ið tað var um reppið, at hann gekk burtur saman við 250 øðrum útróðrarmonnum.

Hann var ein av teimum sum var í lastini og ikki slapp upp. Einaferð koma boð frá brúnni, um tað var nakar snikkari við. Jú, Sigmund meldaði seg til. Tá var tað fjarritarin, sum var dottin í illveðrinum og hevði brotið armin. Sigmund skuldi so smíða ein skinnara til tann brotna armin. Lønin var uppí munnin av whisky!

Tóri og Randi greiða frá, at tað var ongantíð tosað um hetta við Hans Hedtoft heima. Tað var í veruleikanum av tilvild, at tey fingu hetta at vita, tá ið Randi fann hesar myndir.